| | |
|---|---|
| **TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ**<br>**20. mai 2010** | Blað nr.:<br>**8503** |
| | Formansins merki: |

# GERÐABÓK

**Dato: 20. mai 2010 kl. 17.00**
**Stað: Býráðssalurin**
**Málsnr: 71/10-86/10**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Bogi Andreasen
Marin Katrina Frýdal
Jógvan Arge
Elin Lindenskov
Jákup Símun Simonsen
Maria H. Olsen
Annfinn Brekkstein
Levi Mørk
Jan Christiansen
Sjúrður Olsen
Jan Christiansen

**LUTTÓKU IKKI:**
**Levi Mørk** hevur boðað frá, at honum berst frá at luttaka á býráðsfundinum. Fráboðanin er tikin til eftirtektar.

**LUTTÓK EISINI:**
Heri Olsen

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Magnus Dam

**MÁL FYRI OPNUM HURÐUM KL. 18.00**

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**73/10** **2010-0177**

**Mál beind í nevndir**

**Býráðið 20. mai 2010:** Framlagt.

**74/10** **2010-0904**

**Justering av D3-økinum við Nunnuskúlan og KFUK trøðna.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við viðgerð av einum málið um sundurmatrikulering av matr. nr. 807f, beint norðan fyri KFUK, hevur umsitingin lagt merki til nakrar skeivleikar í byggisamtyktarkortinum.

Eftir at hava gjøgnumgingið uppruna kortini, var staðfest at D3-økið við Nunnuskúlan er forskotið vestur- og suðuryvir. Hetta er helst hent í sambandi við digitaliseringina av kortunum í 1990´árunum.

Umsitingin hevur tosað við Petur Nielsen, skrivara hjá býarskipanarnevndini hjá landinum, um málið. Semja var um, at feilurin má rættast, og tí at hesin feilurin hevur verið so leingi í kortinum, má hann rættast sambært býarskipanarlógini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at D3-økið við Nunnuskúlan verður broytt sambært kortskjali dagf. 16.04.2010.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**75/10** **2010-0276**

**Broyting av almennu byggisamtyktini fyri TK og serstøku byggisamtyktini fyri stórutjørn**

**Lýsing av málinum- samandráttur:**

Umsitingin hevur gjørt uppskot til staðseting av frískúlanum (j.nr. 2006-3439) og nýggjum kirkjugarði fyri Hoyvík (j.nr. 2007-2036), oman fyri sambindingarvegin millum Inni á Gøtu og framtíðar innkomuvegin til Tórshavn, sum framhald av Dalinum Langa.

Ein vansi við hesi ætlan er, at byggisamtyktin fyri hetta økið var broytt til ítróttarøki í sambandi við Stórutjørnverkætlanina. Í serstøku byggisamtyktini fyri Stórutjørn, var hetta økið lagt sum ein partur av golfvøllinum.

Sum er, sær ikki út til at Stóratjørnverkætlanin verður veruleiki fyribils. Tað er ikki til at siga um ætlanin verður gjøgnumførd einaferð í framtíðini og um so er, nær og um tað verður í sama skapi og stødd. Tí metir umsitingin, at kommunan ikki eigur at lata alt hetta økið liggja og bíða eftir, at búskaparkreppan er av og SMI ella annað felag aftur vil í gongd við verkætlanina. Hetta hindrar tí vanligu útbyggingini av býnum.

Tí metir umsitingin, at almenna byggisamtyktin fyri TK og serstaka byggisamtyktin fyri Stórutjørn eiga at verða broyttar soleiðis, at kirkjugarður og frískúli kunnu staðsetast her.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at almenna byggisamtyktin fyri TK og serstaka byggisamtyktin fyri Stórutjørn verða broytt sambært kortskjølum dagf. 3. februar 2010 soleiðis, at kirkjugarður og frískúli kunnu byggjast her.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 20. mai 2010:** Tikið av skrá.

**76/10** **2008-4347**

**Umsókn frá Marjun Justinussen Álvur Ziska og Kára Justinussen um broyting av byggisamtyktini fyri matr. nr. 1340c, 1340f, 1341i, 1342 og 1343.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Marjun Justinussen Álvur Ziska og Kára Justinussen søkja í skrivi, dagf. 13. oktober 2008 um, at almenna byggisamtyktin fyri Tórshavnar kommunu verður broytt fyri matr. nr. 1340c, 1340f, 1341i, 1342 og 1343, Tórshavn, frá B4 ídnaðarøki til A3-sethúsaøki ella í øðrum lagi til A1-øki.

Økið talan er um er B4 øki undir Krákugjógv við Villingardalsvegin/Oyggjarvegin, sum tilamans er uml. 8.350 m2. Í dag verður bert lítil partur nýttur til vinnuendamál, tað er matr. nr. 1340g, sum Sp/f Álvur Ziska nýtir sum høvuðsstøð fyr sítt lastbila- og gravmaskinvirksemi.

Kári Justinussen og Marjun Justinussen søktu 21. mars 2007, um at broyta ávíkavist matr. nr. 1341i, 1342, 1343 (mál nr. 2007-1012) og 1343c (mál nr. 2007-1003) frá B4 til A1 sethúsaøki. Hesi má vóru á skrá til byggi- og býarskipanevndarfurn 4. juni 2007. Samtykt var at útseta málini til ein heildarætlan fyri ognirnar fyrilá.

Saman við hesi umsóknini um broyting av byggisamtyktini, liggur ein heildarætlan fyri alt økið, sum er grunda á at ognirnar verða broyttar til A3-øki. Á hesi eru víst 6 stykkir til samanbygd hús á 200 $m^2$ og 16 grundøkir til stakhús á 300$m^2$. Hendan ætlanin eigur at verða viðgjørd meira nágreiniliga, bæði viðvíkjandi tættleika og stødd av grundøkjum av byggideildini og viðvíkjandi vegatkomu, parkering v.m. av teknisku deild (plan- og rakstrardeildini).

-Plan og rakstrardeildin hevur havt umsóknina til eina fyribils gjøgnumgongd og sent umsóknina til hoyringar hjá Landsverk og SEV. Eingin av partunum hevur nakrar beinleiðis viðmerkingar til broytingina av byggisamtyktini. Tó eru onkrir spurningar settir til hjáløgdu útstykkingarætlan.

Umsitingin metir at broytingin av byggisamtyktini kann góðkennast, men hjálagda útstykkingarætlan ikki eigur at verða viðgjørd.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at byggisamtyktin verður broytt frá B4 til A3 sambært hjálagda kortskjali dagf. 20.11.2008.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 26. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**77/10** **<u>2009-1857/9 SG</u>** (sí eisini j. nr. 2009-1188)

**<u>Mótmæli frá íbúgvum oman Mattalág, at gøtunavnið er broytt til Grímsoyarvegur</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Av tí at gøtan 'oman Mattalág' er í tveimum, verður mælt til at finna nýtt navn til ovara partin. Niðari parturin hevur innkoyring frá Jákup Nolsøesgøtu, og mælt verður til, at hesin partur varðveitir navnið *oman Mattalág*. Ovari parturin hevur innkoyring frá Íslandsvegnum, og mælt verður til, at hesin partur fær nýtt navn.

**Gøtunavnanevndin 28. apríl 2009:** Gøtunavnanevndin mælir til at nevna vegastrekkið við innkoyring frá Íslandsvegi *<u>Grímsoyarvegur</u>* eftir íslendsku oynni Grímsey, av tí at talan er um síðuveg til Íslandsveg.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við gøtunavnanevndini.

**Mentamálanevndin 13. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 28. mai 2009:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Uppískoyti:**
Skriv, dagfest 12. juli 2009, saman við undirskriftum er komið frá íbúgvum í gøtuni. Tey mótmæla, at teirra gøta hevur skift navn frá Oman Mattalág til Grímsoyarvegur. Biðið er um fund, og nakrir av íbúgvunum eru boðin á fund við gøtunavnanevndina 28. oktober 2009 at greiða frá sínum sjónarmiðum.

Í skrivinum frá íbúgvunum stendur m.a.:

"Í vikuskiftisbløðunum stóð kunngerð um, at býráðið hevði samtykt at ovari partur av vegnum "Oman Mattalág" skuldi eita Grímsoyarvegur.
Vit vilja við hesum mótmæla og heita á býráðið um at broyta hesa avgerðina. Vit vilja varðveita Mattalág-navnið og vit meta okkum at hava søguligan rætt til tað."

**Gøtunavnanevndin 28. oktober 2009:**
Gøtunavnanevndin hevði fyrst fund við tríggjar íbúgvar í gøtuni. Tey høvdu biðið um fundin, so tey kundu leggja síni sjónarmið fram. Frágreiðing er í málinum (2009-1857/7). Áðrenn fundurin var liðugur, fingu tey at vita, at gøtunavnanevndin fer at viðgera málið aftur.

Nevndin umrøddi síðan málið. Í tilfari, útflýggjað á fundinum, høvdu íbúgvarnir sett upp trý uppskot um, hvussu Mattalág-navnið kann varðveitast á vegastrekkinum, har tey búgva. Fyrsta uppskotið er soljóðandi:

“1. Svingið Mattalág: Eingin býr har og neyvan verður hetta so í nærmastu framtíð. Tá Frælsið varð bygt út í J. Paturssonargøtu varð tað kallað Frælsið út til bogan og J. Paturssonargøta niðan úr býnum. Ikki fyrr enn 1974 varð hetta kallað Mattalág.”

Avtalað varð at kanna, hvør eigur ognina, sum nú hevur adressuna Mattalág 1, og at formaðurin setur seg í samband við viðkomandi og spyr, um tey eru ímóti, at tað pettið verður broytt til J. Paturssonargøtu.

Málið verður viðgjørt aftur á næsta fundi hjá gøtunavnanevndini.

**Gøtunavnanevndin 21. desember 2009:** Gøtunavnanevndin umrøddi ymiskar møguleikar og uppskot við støði í skrivi frá íbúgvunum í gøtuni, ið tey handaðu nevndini á fundi 28. oktober 2009. Gøtunavnanevndin mælir til, at tann parturin av oman Mattalág, sum í fjør fekk gøtunavnið Grímsoyarvegur, í staðin skal eita Mattalágarvegur. Hin parturin varðveitir framvegis navnið oman Mattalág.

**<u>Viðv. gøtunavninum Mattalág</u>**

Í sambandi við viðgerðina av *oman Mattalág* og *Grímsoyarvegi* viðgjørdi nevndin eisini gøtunanavnið *Mattalág*. Einans ein ogn, matr. nr. 900a, hevur adressu har, nevniliga Mattalág 1. Formaðurin kunnaði nevndina um samrøður við eitt av teimum trimum systkjunum, sum nú eiga ognina. Hesin boðaði frá, at tey helst vilja varðveita adressuna/gøtunavnið Mattalág har.

Gøtunavnanevndin heldur tað vera óheppið, at Mattalág-navnið verður nýtt í trimum gøtunøvnum har um leiðir. Eisini verður víst til vegleiðing á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni, www.us.fo, har Umhvørvisstovan m.a. sigur: “Verið sparin við gøtunøvnum”, og har vegirnir *á Frælsinum - Mattalág - J. Paturssonargøta - Niels Winters gøta - Steinatún – Bøkjarabrekka* verða nevndir sum dømi um óhepna navngeving í Tórshavn. ”Lættari hevði verið, um tað bert var *eitt* navn. Orsøkin, at júst hesin vegur hevur fleiri nøvn er, at vegurin ikki altíð hevur verið samanhangandi”, sigur Umhvørvisstovan. - Harumframt er Mattalág navn á einum sera stuttum vegarstrekki, at kalla einum vegbugi, og tað er heldur ikki serliga gamalt gøturnavn.

**Gøtunavnanevndin 21. desember 2009:** Gøtunavnanevndin mælir til, at gøtunavnið *Mattalág* verður strikað, og at Mattalág 1 kemur upp í Jóannesar Paturssonargøtu.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælunum hjá gøtunavnanevndini: 1) Gøtunavnið Grímsoyarvegur verður broytt til

Mattalágarvegur og 2) Gøtunavnið Mattalág verður strikað, og adressan Mattalág 1 kemur upp í Jóannesar Paturssonargøtu og beina málið í býráðið.

**Mentamálanevndin 24. mars 2010:** Nevndin samtykti at beina málið aftur í gøtunavnanevndina.

**Gøtunavnanevndin 22. apríl 2010**: Nevndin samtykti at halda fast við tilmælini frá fundinum 21. desember 2009.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum, ið er soljóðandi: 1) Gøtunavnið Grímsoyarvegur verður broytt til Mattalágarvegur og 2) Gøtunavnið Mattalág verður strikað, og adressan Mattalág 1 kemur upp í Jóannesar Paturssonargøtu og beina málið í býráðið.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**78/10** **<u>2006-3283</u>**

**<u>Brúgvin um Sandá</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Vísandi til málsgongd í málinum j. nr. 2001-0695, við býráðssamtykt av 22. mai 2003, hevur umsitingin umrøtt málið og er av tí fatan, at umráðandi er at kanna aðrar møguleikar fyri tilgongd til málið.

Umsitingin mælir tískil til at leita ráðgeving hjá serfrøðingum innan brúgvabygging við tí fyri eyga at fáa til vega hóskandi byggilistarligt snið, teknisk og fíggjarliga forsvarlig brúgvagerð, sum samstundis líkar krøvini hjá friðingarmyndugleikunum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at játtaðar verða 500.000 kr at gera arbeiðs- og byggiskrá við tilhoyrandi skitsuuppskoti til støðutakan, vísandi til mannagongd fyri verkætlanum hjá Tórshavnar kommunu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 30. oktober 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 8. november 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 500.000 av íløgum.

**Býráðið 16. november 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
**Val av býráðslimum til bygginevnd fyri Brúnna um Sandá sambært § 36 í kommunustýrislógini**

**Býráðið 27. september 2007:** Valdir vóru Jógvan Arge og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
**Umval av býráðslimum í bygginevndina Brúgv um Sandá sambært § 36 í kommunulógini.**

**Býráðið 26. november 2009:** Valdir vórðu Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

**Ískoyti:**
Sambært yvirliti yvir arbeiði fíggjað av íløgum fyri 2009 (skjal nr. 2009-2360/1), eru markaðar kr. 1.000.000,- til fyrireikingararbeiði viðv. Brúnni um Sandá, sum partur av langtíðaríløguætlan kommununar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla til at játta avsettu upphæddina á kr. 1.000.000,- til framhaldandi projektering og fyrireikingar, og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 3. desember 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevndin 9. desember 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 17. desember 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur á fundum viðgjørt spurningar til framhaldandi projektering av brúnni og í sambandi við fyrireikingarnar fer nevndin m.a. at mæla til, at arbeiðið hjá nevndini eisini skal fevna um vegastrekkini báðumegin sjálva brúnna.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býararkitekturin og býarverkfrøðingurin mæla til at taka undir við tilmælinum í fundarfrásøgn nr. 7 (j. nr. 2006-3283/23) og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 29. apríl 2010:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 12. mai 2010:**

Borgarstjórin var ikki við til viðgerðina av hesum máli.

Tekniski stjóri greiddi frá málinum.

Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum í fundarfrásøgn nr. 7 (j. Nr. 2006-3283/23) soleiðis, at arbeiðið hjá bygginevndini eisini kemur at fevna um vegastrekkini báðumegin brúnna um Sandá.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**79/10** **<u>2009-0427</u>**

**<u>Status - Uppgerð fyri liðug arbeiði, sum eru fíggjað av íløgum 2009</u>**

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Umsitingin leggur fram yvirlit yvir status á teimum ymsu verkætlanum innan tekniska økið. Talan er um anlegsarbeiði innan:

1. Kloakkir
2. Vegir
3. Vatn
4. Renovatión
5. Fíðkan av býnum
6. Kirkjugarðar
7. Aðrar verkætlanir

Ætlanin er framyvir at fáa staðfest figgjarliga status í íløguarbeiðum, og tí skal tekniska nevndin, um fíggjarnevnd og býráðið, staðfesta framløgdu uppgerð innan kloakkarbeiði. (víst verður til niðurstøðuna í máli nr. 2007-0649 Kloakk í Skraddaragøtu).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
at loka lidnu kloakkverkætlaninar sambært yvirliti j. nr. 2009-0427
at flyta nettoavlopið av lidnu kloakkverkætlanum á kr. 1.719.577,- til kloakk-verkætlanir í 2009.

**Tekniska nevnd 12. november 2009:** Nevndin samtykti at taka undir við til-mælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti.**
Umsitingin leggur fram yvirlit yvir status á íløguarbeiðum innan vegir, kloakkir, fríðkan av býnum og kirkjugarðar (j. nr. 2009-0427/8).

Arbeiðini, ið umsitingin hevur staðfest liðug, eru:

| **Navn** | **Journalnr.** | **Ætlan 2009** | **Nýtsla 2009** | **Munur** | At flyta |
|---|---|---|---|---|---|
| Kloakk Sortudýki/ringvegur | 2004-2696 | 66.000 | 0 | 66.000 | 66.000 |
| Kloakk í Hesti | 2004-2541 | 1.873.000 | 2.048.797 | **175.797** | -176.000 |
| P-økið á Skarðshjalla | 2005-2292 | 27.000 | 0 | 27.000 | 27.000 |
| Hoyvíkar skúli ferðslutrygd | 2006-2731 | 42.000 | 0 | 42.000 | 42.000 |
| Rólantsgøta leingjan | 2003-1519 | 194.000 | 0 | 194.000 | 194.000 |
| Reinsan av Hoydalsá 2. stig | 2007-0364 | 802.970 | 815.165 | **12.195** | -12.000 |
| Kloakk Valbjørn Dalsgarð | 2007-0292 | 201.000 | 170.297 | 30.703 | 31.000 |
| Yvirflatuvatn í Svanga | 2006-0896 | **218.000** | **0** | **218.000** | -218.000 |
| P-økið á Stórheyggi | 1999-2006 | 627.000 | 329.285 | 297.715 | 298.000 |
| Kloakk í Skraddaragøtu | | 1.889.000 | 1.590.812 | 298.188 | 298.000 |
| | | | | | |
| Kirkjugarðurin á Svínaryggi | 2006-1344 | 165.000 | 303.927 | **138.927** | -139.000 |
| Graslíki Lítlagil | | 196.000 | 185.213 | 10.787 | 11.000 |
| Gøtur á Flat | | 116.000 | 109.370 | 6.630 | 7.000 |
| | | | | | **429.000** |

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at staðfesta omanfyri standandi arbeiði liðug. Mælt verður harumframt til at avlopið álj. kr. 429.000,- verður flutt til at fíggja verkætlanina 'Ferðslupolitikkur og ferðslutrygdarætlan í Tórshavnar kommunu' – j. nr 2006-3419 0427 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 29. apríl 2010:** Vísandi til teldupost frá borgarstjóranum, dagfest 22. apríl 2010 (sí j. nr. 2010-0322/4) til nevndarlimir, samtykti ein meirluti, Marin Katrina Frýdal, Levi Mørk og Elin Lindenskov, at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, mælir til, at ferðslutrygdarætlanin verður gjørd av umsitingini, og at avlopið verður nýtt til annað.

**Fíggjarnevndin 12. mai 2010:** Tekniski stjóri greiddi frá málinum.

Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov og Jógvan Arge, mælir býráðnum til at avlopið á 429.000 kr. frá íløguarbeiðum innan vegir, kloakkir, fríðkan av býnum og kirkjugarðar verður flutt til at fíggja verkætlanina 'Ferðslupolitikkur og ferðslutrygdarætlan í Tórshavnar kommunu'.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, mælir til, at ferðslutrygdarætlanin verður gjørd av umsitingini, og at avlopið verður nýtt til annað.

**Býráðið 20. mai 2010:** Tikið av skrá.

**80/10** **2006-3419 (sí eisini mál nr 2007-2041) - GHM**

**Ferðslupolitikkur og ferðslutrygdarætlan í Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Tekniska nevndin setti 13. mars 2001 ein arbeiðsbólk at orða ein kommunalan ferðslupolitikk, og var bólkurin m.a. biðin um at orða høvuðssjónarmið ella tær meginreglur, ið skulu vera stýrandi fyri kommunalan ferðslupolitikk og herundir eisini ta mannagongd, ið skal nýtast, tá ið kommunan tekur støðu í ferðslumálum.

Bólkurin var m.a eisini biðin um at gera eina heildarætlan viðv. tungari ferðslu, serliga í miðbýnum og at orða rætningslinjur á økinum, m.a. hvar koyrast kann og nær serligt loyvi eigur at fyriliggja.

Arbeiðsbólkurin lat gera eina frágreiðing í mars 2002 og í niðurstøðuni var mett, at frágreiðingin var eitt munagott ískoyti hjá kommununi at hava sum eitt amboð, ið skal nýtast í sambandi við orðing av ferðslupolitikki.

Í frágreiðingini vóru eisini gjørdar nógvar niðurstøður, sum hava verið grundarlag fyri nógvum avgerðum, ið tekniska nevndin hevur tikið. Sum dømi kann nevnast, at gjørd eru mong ferðtálmandi átøk við eitt nú barnagarðar eins og rundkoyringar eru gjørdar á vandamiklum vegamótum. Nevnast kann eisini, at støða er tikin um ferðing hjá tungari ferðslu í innara parti av býnum.

Fyri at koma víðari í málinum at orða ein ferðslupolitikk í Tórshavnar kommunu, verður mett, at tað gerst neyðugt at støða verður tikin til um arbeiðast skal víðari við teirri endamálsorðing, ið sett var bólkinum í 2001.

Málið í sjávum sær er eisini at orða eina ferðslutrygdarætlan fyri kommununa sambært nullhugsjónini. Størri fokus skal setast á lógarverkið innan ferðslu-

viðurskifti og byggisamtyktina hjá kommununi eins og tað er ynskiligt hjá umsitingini at hava eina vegahondbók, sum tekur støði í vegabygging grundað á galdandi vegtekniskar normar.

**Fíggjarlig viðurskifti.**
Tað er torført at meta um kostnaðarstøðið fyri omanfyri nevnda arbeiðið, men væntast kann, at arbeiðsbólkurin skal hava møguleika at útvega sær eksterna ráðgeving. Skotið verður upp at seta eina passandi upphædd álj. kr.100.000,00 til arbeiðið.

Tekniska nevndin skal taka støðu til, um ein arbeiðsbólkur skal setast at orða ein kommunalan ferðslupolitikk, og hvørji umboðini í bólkinum skulu verða.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla ti,l at settur verður ein arbeiðsbólkur at halda fram við tí arbeiði, ið sett varð í gongd í 2001.

Støða skal takast til, hvørji umboð skulu verða í bólkinum, herundir um Ráðið fyri ferðslutrygd skal verða umboðað, og at hesin bólkurin kemur við einum endur-skoðaðum arbeiðssetingini at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 30. november 2006:** Nevndin mælir til at somu umboð, sum vóru í bólkinum halda fram við arbeiðinum og at heita á nevndina hjá RFF um at velja umboð í bólkin.

Heitt verður á býráðið, um fíggjarnevndina, um at taka undir við ætlanini.

Nevndin samtykti eisini, at bólkurin kemur við einum endurskoðaðum arbeiðs-setningi at leggja fyri nevndina aftur.

**Fíggjarnevndin 6. desember 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 14. desember 2006:** Einmælt samtykt.

**-** Arbeiðsbólkurin leggur fram uppskot til arbeiðssetning.

**Tekniska nevnd 7. juni 2007:** Bólkurin legði fram uppskot um arbeiðssetningin. Nevndin samtykti at taka undir við arbeiðssetninginum.

**Ískoyti:**
Í sambandi við at farið er undir arbeiðið at orða ein parkeringspolitikk fyri Tórshavnar kommunu (sí mál nr. 2009-1547) og at gjørd er ein landsumfevnandi ferðslutrygdarætlan (sí mál nr. 2007-2041), skal støða takast til um kommunan skal seta pening av til at gera eina ferðslutrygdarætlan galdandi fyri Torshavnar kommunu. Umsitingin hevur samskift við ráðgeva ísv við tilgongdina í málinum

um parkeringspolitikk og kemur at greiða frá kostnaðinum av eini slíkari ferðslutrygdarætlan.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á plan- og rakstrardeildini mæla teknisku nevndini til at játta 500.000 til verkætlanina.

**Tekniska nevnd 3. desember 2009:** Málið útsett.

- Umsitingin kunnar um ferðslutrygdarætlan sum arbeiðsamboð.

**Tekniska nevnd 14. januar 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tekniska nevnd 11. februar 2010:** Ein meirluti, Marin Katrina Frýdal, Jákup Símun Simonsen og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum til fundin tann 3. desember 2009 og at játta kr. 400.000,- fíggjað av rakstri innan tekniska økið.
Ein minniluti, Sjúðrur Olsen, mælir til, at arbeiðið verður gjørt av umsitingini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 429.000,- til at fíggja verkætlanina sambært avlopi av íløguprojektum fyri 2009 sambært mál nr. 2009-0427 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 29. apríl 2010:** Vísandi til teldupost frá borgarstjóranum, dagfest 22. apríl 2010 (sí j. nr. 2010-0322/4) til nevndarlimir, samtykti ein meirluti, Marin Katrina Frýdal, Levi Mørk og Elin Lindenskov, at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, mælir til, at ferðslutrygdarætlanin verður gjørd av umsitingini.

**Fíggjarnevndin 12. mai 2010:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov og Jógvan Arge, mæla býráðnum til at játta kr. 429.000,- til at fíggja verkætlanina við avlopi av íløguprojektum fyri 2009 sambært mál nr. 2009-0427.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen, mælir til, at ferðslutrygdarætlanin verður gjørd av umsitingini, og at avlopið verður nýtt til annað.

**Býráðið 20. mai 2010:** Tikið av skrá.

**81/10** **<u>2010-1159</u>**

**Ársroknskapurin fyri 2009 hjá Tórshavnar kommunu**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kommunustýrislógini hevur fíggjarnevndin ábyrgd av, at liðugur roknskapur við møguligum viðmerkingum verður grannskoðaður.

**Fíggjarnevndin 12. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at góðkenna ársroknskapin.

**Býráðið 20. mai 2010:** Einmælt samtykt.

**82/10** **2010-1160**

**Grannskoðarafrágreiðing fyri 2009 hjá Tórshavnar kommunu**

**Fíggjarnevndin 12. mai 2010:** Framlagt.

**Býráðið 20. mai 2010:** Framlagt.

# Mál uttan fyri skrá:

**83/10** **2009-1391/18 SG**

**Útbygging av Hoyvíkshøllini**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Hoyvíkshøllin varð tikin í nýtslu í 2002. Neyðugt er við dagføring av høllini m.a. tí hølisviðurskiftini ikki eru nøktandi. Talan er m.a. um umklæðingarrúm, wc og gongd, sum eru ov smá. Eisini er tørvur á einum duri, soleiðis at fólk ikki koma beint inn í høllina uttanífrá. Í sambandi við nevndu dagføring skal gerast ein lýsing av tørvinum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 100.000 kr. av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi, til at lýsa tørvin á at dagføra Hoyvíkshøllina og gera kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 til at lýsa tørvin á at dagføra høllina og gera kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Atkvøtt var um tilmæli hjá fíggjarnevndini, sum var samtykt við 9 atkvøðum fyri og 0 ímóti. Fyri atkvøddu Heðin Mortensen, Bogi Andreasen, Marin K. Frýdal, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Jákup S. Simonsen, Sjúrður Johannesen, Annfinn Brekkstein, Inga Dahl. Ingrid Henriksen og Jan Christiansen greiddu ikki atkvøðu.

**Uppískoyti:**
Skotið verður upp at byggingin verður skipað á tann hátt, at 260 m$^2$ verða bygdir í tveimum hæddum, tilsamans 520m$^2$, har bert veghæddin verður innrættað endaligt. Á veghædd verður høvuðsinngongd og forhøll, 4 áskoðaravesir, goymslur og tvey umklæðingarrúm við brúsum. Hetta loysir í fyrstu atløgu bráðfangis tørvin.

Í kostnaðarmetingini er roknað við, at restin av bygninginum ikki er innrættaður, hvørki við innveggjum, hurðum, el- og ljósbúnaði, hita-og sanitetsbúnaði endaligum lofti, gólvbúnaði, málaraarbeiði og trappu. Tað er fyrireikað fyri lyft, men lyftin er ikki við í kostnaðinum.

Kostnaðurin er 4.488.000 kr íroknað ókent, ráðgeving og mvg.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,5 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (journal-nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndina.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

- Tilmæli kemur til fundin.

**Mentamálanevndin 24. mars 2010:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Trivnaðarstjórin greiddi frá málinum.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**84/10** **1999-0345**

**Høllin á Hálsi**

**Lýsing og samandráttur av málinum:**
Á fundi í býráðnum 23. september 2004 varð m.a. samtykt at gera eina byggitekniska meting av høllini.

Byggideildin hevur havt samstarv við BBP Arkitektar A/S um at útbyggja og umvæla høllina. Byggideildin hevur á fundi í býráðnum 30. mars 2006 kunnað um ætlaðu umbyggingina av Ítróttarhøllini á Hálsi.

Í uppskotinum er ein kostnaðarætlan og ein tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at fara undir at gera hesa verkætlanina so skjótt sum til ber. Tað kann ikki metast ráðiligt at halda fram við at lappa uppá verandi høll. Ei heldur má tað metast ráðiligt at fara undir at umvæla høllina bert fyri at fáa hana í brúkiligan stand tó uttan at tillaga hana til øktan tørv og krøv til nýtslu.

Høllin á Hálsi hevur altíð staðið sum ímyndin av føroyskum innanduraítrótti, harumframt at vera stoltleikin fyri samkomu- og ítróttarvirksemi í Tórshavn. Hetta eigur Tórshavnar kommuna, sum landsins høvuðsstaður at leggja seg eftir at kunna siga um Høllina á Hálsi framyvir.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir mentamálanevndini til at taka undir við tilráðingini frá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Nevndin var á staðnum og var víst runt í høllini.

**Uppískoyti/tilmæli:**
Høllin, ið er yvirtikin av Tórshavnar kommunu fyrst í 2005, er niðurslitin, og tørvar átrokandi ábøtur. Fyri at fáa sum mest burtur úr eini so umfatandi umvæling, hava vit mett rættast eisini at hava við í hesum arbeiði eina dagføring av høllini, ið alt annað enn líkur krøvini, ið eru til eina tílíka høll í dag. Tí fyriliggur eitt skitsuuppskot, sum tekur støði í hesum. Atlit eru eisini tikin til, at hon framhaldandi, eftir at arbeiðið er gjørt, fer at verða “høllin” í Føroyum. Býararkitekturin hevur sagt um skitsuuppskotið, at hetta er eitt av teimum betru.

Í skitsuuppskotinum er samantvinna umbygging, uppíbygging og umvæling. Sambært kostnaðarmetingini hjá BBP-arkitektum kostar arbeiðið kr. 32.850.000 (danskir prísir, primo 2006)

Afturat hesum kemur projekterings- og ráðgevaraútreiðslur, kr. 3.942.000 (12% av 32 mill kr.).

Av tí at uppskotið ikki bert inniheldur viðlíkahald, men eisini uppíbygging v.m., halda vit tað er rætt eisini at býta samlaða metingina upp í tveir partar. Annar er umvælingarparturin og hin er uppí- og umbyggingar parturin.

Út frá kostnaðarmetingini kemur fram, at kostnaðurin fyri alt arbeiðið er í “føroyskum kr” 37.777.500 mill. kr. Deila vit hetta upp í áður umtalaðu partar, fáa vit hesa uppdeiling:

| | | |
|---|---|---|
| Umvæling | kr. | 21.903.095 |
| Uppí- og umbygging | - | 15.874.405 |
| Samlað | kr. | 37.777.500 |

Í fjør játtaði býráðið 2,5 mill. kr. á konto 82 til Høllina á Hálsi at gera umvælingar fyri í 2006.

Býararkitekturin mælir til at tikið verður av øðrum av niðanfyri standandi tilmælum. Bæði ganga uppá at fáa sett projekteringsarbeiði í gongd nú.

Í tí fyrra tilmælinum verður mælt til, at arbeiðið verður gjørt út í eitt. Hetta hevur við sær, at eingin kann brúka høllina í byggitíðini, sum ætlandi verður liðug í september 2008.

Tað seinra mælir til, at arbeiðini verða gjørt í 4 byggistigum, soleiðis at yvir eitt

rímiligt tíðarskeið stendur høllin liðug, sum skitsuuppskotið leggur upp til.

**1. tilmæli**

<u>at</u> projekteringin av skitsuuppskotinum verður gjørt av BBP-arkitektum, sum hava tillagað eina nýggja tíðarætlan. Teir kunnu byrja uppá projekteringina miðjan august í ár og hava hana lidna miðjan mai 2007. Arbeiðið kann byrja fyrst i juli 2007 og halda fram, til tað er liðugt, áðrenn hondbóltskappingin byrjar aftur í september 2008.

<u>at</u> játtanin til konto 82 verður hækkað við teim knapt 22 mill. kr., og tær írestandi knapt 16 mill. kr. sum íløga ella tiknar sum lán. Projekteringskostnaðurin verður goldin av teim 2,5 mill. kr., sum eru á konto 82, og tær írestandi 1,4 mill. kr. verða deildar soleiðis, at 1 mill. fer til konto 82 og 0,4 mill. kr. sum íløga ella lán. Sett upp í skema sær tað soleiðis út yvir 2 fíggjarár:

| | |
|---|---|
| Hækka játtaninna til konto 82 | kr. 21.903.095 |
| Partur av projekterings og ráðgeving | - 1.000.000 |
| Samlað hækking til konto 82 | kr. 22.903.095 |
| | |
| Játtan til íløgu ella at upptaka lán | kr 15.874.405 |
| Partur av projektering og ráðgeving | - 442.000 |
| Samlað íløga ella lántøka | kr. 16.316.405 |

Hækkan av játtan til konto 82 og játtan til íløgu ella lántøka verða gjørd yvir eitt tvey ára skeið, so hvørt sum tørvur er á peningi.

| | |
|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2007 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. 12.000.000 |
| Og íløga ella lántøka verða gjørd fyri fíggjarárið 2007 við | kr. 8.000.000 |
| Fyri fíggjarárið 2008 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. 11.000.000 |
| Og íløgan ella lántøka verður gjørd fyri fíggjarárið 2008 við | kr. 9.000.000 |



Omanfyri sæst tíðaraksin fyri projektering og byggitíðina, um arbeiðið verður gjørt út í eitt.

**2. tilmæli**
Í øðrum lagið verður mælt til at projektið verður gjørt liðugt, soleiðis at partar av arbeiðnum kunnu longu byrja í 2007. Arbeiðið kann tá leggjast soleiðis tilrættis, at tað verður boðið út í størri og minni bitum alt eftir tí, sum er best byggitekniskt, og sum pengar verða settir av til.

at peningur verður settur av soleiðis, at projekteringin kann gerast liðug av BBP-arkitektum miðskeiðis í apríl 2007. Hetta fyri at umvælingararbeiðið kann gerast við støði í tí lidna projektinum, soleiðis at arbeiðið verður gjørt í størri og smærri bitum.

at peningur verður settur av til at gera 1. byggistig í fyrstu atløgu, sum umfatar rúmini á eystursíðuna fyrst. Hetta inniheldur at skifta takið, hækka gólvið á hædd við vallargólvið, umvæla og broyta skiftirúmini, wc rúmini og harvið eisini gera kloakkina á nýggjum og asfaltera gongubreytuna. Framsíðan skal gerast eftir tí nýggja uppskotinum, tvs. skifta klædningin út og skifta og broyta vindeyguni og úthurðarnar. Seta nýggja takrennu og rennustokk upp. Hesi arbeiði kunnu gerast við at hækka játtanina til konto 82 við 9 mill. kr. til fíggjarárið 2007.

Ein møgulig langtíðar ætlan kundi verið hendan.

**1. byggistig**
Umvæling og broyting av hølum, ið liggja úti við eystur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar. Takið skal eisini skiftast.

**2. byggistig**
Útbyggja endan norðureftir, við øllum.

**3. byggistig**
Útbyggja endan suður eftir við øllum.

**4. byggistig**
Taka niður áskoðarabeinkirnar og flyta vøllin inn í mittuna. Gera nýggj áskoðarapláss og umskapa rúmini, sum liggja út til vestur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at 2,5 mió. kr., sum eru játtaðar til umvælingar av høllini 2006, verða nýttar til projektering av umvæling og umbygging, sambært uppskoti frá BBP Arkitektar A/S, februar 2006.

Eisini samtykt at viðgera málið aftur í mentamálanevndini eftir summarfrítíðina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini vóru á fundinum og greiddu frá.

Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**Nýtt:**
Kommunan hevur arbeitt við einum projektið, ið fór at kosta 40 mill kr. umframt projekteringsútreiðslur.

Projekteringin er komin væl áleiðis og sambært sáttmála millum arkitektavirkið og Tórshavnar kommunu (TK) skal projektforslagið góðkennast av TK. Hetta liggur nú klárt til góðkenningar

Samlaði kostnaður fyri projektið er kr 47.680.000 við prístalsregulering og projektering.

Arbeiði gerast í 4 byggistigum.

| | |
|---|---|
| 1. byggistig: | 1. februar 2008 – 31.oktober 2008 |
| 2. byggistig: | 1. januar 2009 – 1. februar 2010 |
| 3. byggistig: | 1. apríl – 27. august 2010 |
| 4. byggistig: | 1. september – 30. juni 2011 |

Arbeiði verður fíggja av konto 90 soleiðis:

| | |
|---|---|
| Áður játtað, | 2.500.000 mill kr. |
| At játtað fyri 2007 | 6.000.000 mill kr |
| At játtað fyri 2008 | 6.415.000 mill kr |
| At játtað fyri 2009 | 14.326.680 mill kr |
| At játtað fyri 2010 | 12.829.240 mill kr |
| At játtað fyri 2011 | 5.599.080 mill kr |

Býararkitekturin mælir til at projektuppskotið, tíðarætlan og fíggingar-háttur verða góðtikin.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við tilmælinum frá býararkitektinum. Somuleiðis verður mælt til at seta bygginevnd fyri verkætlanina, sambært ”Politisku/fyrisitingarligu mannagondir fyri verkætlanir”

**Mentamálanevndin 11. juni 2007:** Samtykt at taka undir við tilmælinum frá

trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. juni 2007:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. juni 2007:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
5 byggifyritøkur vóru innboðnar til at prekvalifisera seg til at bjóða uppá út-og umbyggingina av Høllini á Hálsi. Freistin at lata inn upplýsningar um fyritøkuna varð 6. mars kl 14.00. Av teim 5 boðnu, lótu 4 fyritøkur inn tilfar, og vóru tær allar góðkendar.

Lisitatiónin varð 28. apríl 2008 kl 10:00
Hesi tilboð komu inn

| Fyritøka | 1 byggistig | 3 byggistig |
|---|---|---|
| J & K Petersen Contractors | Einki boð | Einki boð |
| Búsetur Sp/F | kr 58.798.462,80 | kr 64.143.777,60 |
| E.Pihl & Søn Føroyar P/F | kr 64.341.329,28 | kr 69.964.259,00 |
| MT Højgaard Føroyar P/F | kr 70.810.793,03 | kr 76.310.793,03 |

Ráðgevarin BBP-arkitekter, mettu at øll innkomnu tilboð vóru kontosiónsmessig. Víðari mæltu ráðgevin til at tikið varð av tilboðnum frá Búsetur, og at arbeiðið skuldi gerast í einum byggistigi.

Bygginevndin gjørdi hetta tilmæli.

Ein meiriluti í bygginevndin, mælir frá at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 58.798.462,00 kr, fyri at gera arbeiði í einum. Somuleiðis mælir ein meiriluti frá, at taka av lægsta tilboðnum áljóðandi 64.143.777,00 kr, fyri at gera arbeiðið í stigum.

Grundgevingin fyri frámælinum er, at játtaðar eru bert 48 mill. kr. til at gera arbeiðið í stigum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við bygginevndini vísandi til at rúm ikki er fyri verkætlanini á konto 90.

**Mentamálanevndin 3. desember 2008:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Fíggjarnevndin 10. desember 2008:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 29. desember 2008:** Atkvøtt var um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov, Inga Dahl, Vagnur Johannesen, Beate L. Samuelsen og Jan Christiansen.

Greiddu ikki atkvøðu: Sjúrður Olsen og Høgni Mikkelsen

**Uppískoyti:**
Høllin, sum Tórshavnar kommuna yvirtók í 2005, er niðurslitin og tørvar átrokandi ábøtur. Arbeitt hevur verið við at fara undir útbygging av høllini, men býráðið samtykti 29. desember 2008, at arbeiðið verður ikki gjørt í hesum umfari.

Tørvurin á umvælingum í høllini er stórur, og tí verður neyðugt at gera eina tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at framflyta kr.100.000 av játtan til umbygging av høllini á Hálsi til at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum og kostnaðarmeting.

**Mentamálanevndin 27. mai 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, til at játta kr. 100.000 at gera tørvsmeting av bráðfeingis umvælingum við kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. mai 2009:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini og játta kr. 100.000 av játtaðum íløgum á trivnaðarøkinum ætlaðar Høllini á Hálsi.

**Býráðið 28. mai 2009:** Einmælt samtykt.

**Nýtt**:
Tørvsmetingin av bráfeingis umvælingum og kostnaðarmeting er nú gjørd. Eystursíðan treingjur mest til ábøtur. Talan er her um at umvæla/skifta út umklæðingar- og brúsurúm, klædning og toilettir. Kostnaðarmetingin er sett upp í trimum punktum, sí skjálið frá HMP-Consult, dagfest 3. november 2009.

Her verður tikið saman um metingina:

| | | |
|---|---|---|
| Brúsu- og umklæðingarrúm | kr. | 3.484.100 |
| Toilettir | kr. | 861.300 |
| Arbeiðstøka samlað | kr. | 4.895.400 |
| Óvantað 15% | kr. | 734.310 |
| Projektering og eftirlit | kr. | 675.565 |
| | | |
| Samlað uttan mvg | kr. | 6.305.275 |

Mvg 6,25% kr. 390.927

Samlað við MVG kr. 6.696.202

Eftir at hesar ábøtur eru gjørdar, treingir gólvið til at skiftast. Tað er í sera ringum standi, og krevur nógv dagligt viðlíkahald. Men tá hugsað verður um at takið lekur, eigur takið at verða skift áðrenn gólvið, soleiðis at gólvið ikki fær vatnskaða tá takið verður skift.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta 4,4 mió. kr. av avlopinum av áður játtaðari upphædd til Høllina á Hálsi (j. nr. 1999-0345). Tøkar eru íalt 8,9 mió. kr.

**Mentamálanevndin 11. november 2009:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Ískoyti/tilmæli:**
Fyri at gera bráðfangis umvælingar lidnar – mettar til 6,7 mió. kr. – mæla kommunustjórin, tekniski stjórin og mentamálaleiðarin til at játta 3,0 mió. kr. afturat av undirkonto 5776 í fíggjarætlanini fyri 2010 til arbeiðið.

**Mentamálanevndin 17. november 2009:** Nevndin tók undir við tilmælinum um netið.

**Fíggjarnevndin 18. november 2009:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælunum.

**Býráðið fyri læstum hurðum 26. november 2009:** Málið varð umrøtt.

**Býráðið 26. november 2009:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 18. november 2009.

**Ískoyti:**
Jógvan Arge ynskir málið á skrá.

**Fíggjarnevndin 14. apríl 2010:** Tekniski stjórin og býararkitekturin greiddu frá málinum. Sáttmáli verður í næstum gjørdur við HMP Consult um ráðgeving og projektering. Projekteringin tekur upp til tveir mánaðir, og mælt verður til, at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión í summar.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Kunnað varð um málið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at bjóða arbeiðið út í innbodnari høvuðsentreprisu.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**85/10** **2010-0521**

**Graslíki á vøllin við Eysturskúlan, sum er 75 x 47 m**.

Vøllurin við skúlan er ein grúsvøllur, sum ikki er brúkaravinarligur í tí standi hann er í. Við at umvæla vøllin við m.a. graslíki, verður hann eitt gott íkast fyri skúlan og eysturbýin.

Ein kostnaðarmeting er gjørd:

| | |
|---|---|
| 1. Niðurtøka, avgrevstur og burturkoyring av mold og sandi v.m. | 215.000 |
| 2. Drenrør at leggja og binda í verandi kloakk, íroknað brunnur | 15.400 |
| 3. Planering við 0-75mm, 0-16 mm og nýggj gøta | 339.000 |
| 4. Graslíki, íroknað gummigranulat undirlag og ífyllu av sandi | 1.260.000 |
| 5. Betongarbeiði, rimaverk, stólpar og hegt | 532.000 |
| 6. Ljósmastrafundament, 12 m høgar ljósmastrar 6 stk. | 117.000 |
| 7. Hamping av økinum kring vøllin | 50.000 |
| 8. Fótbóltsmál (2 stk. 5 m breið og 4 stk. Smærri) | 60.000 |
| Ókent uml. | 168.600 |
| Projektering og eftirlit | 143.000 |
| Tilsamans | 2.900.000 |

Allar upphæddir eru uttan MVG

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at játta kr. 2,9 mió kr. umframt mvg til gerð av graslíkisvølli til Eysturskúlan av kontu 4175 Dagføring av skúlum og at bjóða arbeiðið út.

**Mentamálanevndin 17. mai 2010:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Halla Samuelsen, Elin Lindenskov og Jákup Símun Simonsen samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti Annfinn Brekkstein tekur støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**86/10** **2010-0888**

**Umbøn um játtan til innrætting av e-lonini í Eysturskúlanum**

**Lýsing av málinum**
Í samband við, at e-lonin í Eysturskúlanum verður innrættað til 10. flokk í Tórshavnar kommunu, verður biðið um, at 500.000 kr. verða játtaðar av løgujáttan fyri 2010, konto 4175 Dagføring av skúlum. Játtanin skal nýtast til innrætting og dagføring av e-lonini

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til, at 500.000 kr. verða játtaðar av løgujáttan fyri 2010 til fólkaskúlan til innrætting og dagføring av e-lonini.

**Mentamálanevndin 28. apríl 2010:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 20. mai 2010:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 20. mai 2010:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**FUNDUR LOKIN KL. 19.00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Marin Katrina Frýdal | Halla Samuelsen | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Vagnur Johannesen | Levi Mørk |
| Maria H. Olsen | Jákup Símun Simonsen | Jan Christiansen |
| | Heðin Mortensen | |